## Hvørki køliskáp ella sjónvarp

Næstan fimm prosent av húsarhaldunum í Íslandi hava hvørki køliskáp ella sjónvarp, men næstan fýra prosent av øllum húskjum hava bát. Tað sæst í einari kanning, sum Hagstovan í Reykjavík hevur gjørt, og sum byggir á upplýsingar í árunum frá 2006 til 2008. Samstundis sæst, at altsamt fleiri íslendingar fáa sær bil. Í 2006 høvdu 13 prosent av húsarhaldunum ongan bil, men í fjør var tað talið 9 prosent. Summi hava fleiri bilar. Kanningin vísir, at í fjør høvdu 35 prosent av húskjunum tveir bilar, og at 6,5 prosent av húskjunum høvdu fleiri enn tríggjar bilar.



## Rønn illa umtókt

Summir eygleiðarar hava gitt, at Lars Løkke Rasmussen, forsætisráðharri, fer at umskipa stjórnina í næstum, og at hann tá fer at velja annan ráðharra í innflytaramálum fyri Birthe Rønn Hornbech. Hon hevur verið í eldinum fleiri ferðir í sambandi við ymisk innflytara- og flóttafólkamál. Sambært einari kanning hjá Gallup høvdu nógvir danir tikið undir við, at hon fekk sekkin sum ráðharri. Har siga 31 prosent, at Birthe Rønn Hornbech eigur at fara frá. Ein annar ráðharri, sum heldur ikki er serliga væl umtóktur, er mentamálaráðharrin Carina Christensen.

# Skálaberg fekk stórfing

**Næstan líka nógv fólk tóku ímóti Skálaberg í Ánunum annan jóladag, sum tá ið hann á fyrsta sinni kom til Føroya. Alt tað, sum hendi, tá ið Skálaberg varð tikin í russiskum sjógvi mitt í november, kann ikki hava verið annað enn ein misskiljing, heldur reiðarin Hanus Hansen**



*Bilarnir ýldu, og Skálaberg svaraði aftur, tá ið hann 2. jóladag kom inn móti bryggjuni í Ánunum*

SKÁLABERG
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*
*Myndir: Dávur Winther*

Tá ið klokkan var farin nakað av ellivu annan jóladag, var ein streymur av bilum úr Klaksvík norður í Norðhavnina. Onkrir bilar vóru eisini komnir langvegis.

Ein fjøld av fólki vildi sleppa at taka ímóti Skálaberg, sum var komin úr Murmansk, har hann hevði ligið síðan 18. november.

Skipið hevði boðað frá, at tað fór at verða í Norðhavnini klokkan hálvgum tólv, og tað helt væl.

Skálaberg kom suður gjøgnum Kallsoyarfjørð, og tá ið hann var komin suður um Kunoyarnes og stevndi móti Ánunum, fóru allir bilarnir at ýla, og Skálaberg svaraði aftur. Har kom eisini bjargingarbáturin Ziska, ið somuleiðis gav ljóð frá sær.

Nakrir menn stóðu har frammi, tá ið lagt varð at, og kokkurin stakk høvdið út gjøgnum kúgveygað.

Tá so Skálaberg kom nærri, varð sent upp nógv fýrverk.

Skjótt gekk at binda, og fyrstur umborð varð tollarin. Men hann gjørdi skjótt av, skuldi bara hava undirskrift skiparans, og so tustu fólk umborð at heilsa upp á síni, mussa og klemma.

### Jólalig messa

Í messuni, sum var prýdd við jólaperum, bjóðaði skipið kaffi, frukt og karamellur. Neyvan russiskar karamellur, sum onkur tók til.

Eingin hátíðarlig móttøka var, ongar røður, sjálvt um borgarstjórin Gunvá við Keldu og aðrir almennir persónar vóru har. Eitt blómutyssi kom frá kommununi at bjóða skipara og manningum vælkomnum heim.

Prátað var dúgliga, og øll vóru í góðu lag.

– Eg eri fegin um, at hetta spældi so væl av, segði Hanus Hansen, reiðari, sum sjálvsagt var í Norðhavnini og tók ímóti.

### Ófatiligt

Hann heldur, at tá ið Skálaberg var tikin, var tað tí, at myndugleikarnir ikki høvdu skilt, at føroysku bátarnir sjálvir býta kvotuna sínamillum. Soleiðis er tað alla aðrastaðni. Landið, har fiskað verður, er bara áhugað í at vita, at fiskað ikki verður meira enn loyvt, og í hesum førinum er føroyska kvotan langt frá uppfiskað. Hetta hevur alt verið ein stór misskiljing.

Hanus Hansen skilir ikki, at skiparin fekk eina bót upp á fimm mió. krónur, men kortini slapp skipið avstað uttan at gjalda bótina.

- Teir bóðu skipið um bara at fara.

Dómin hevur hann ikki kunnað lisið enn, tí reiðaríið bíðar eftir ensku umsetingini.

**– Var eingin tulkur við?**

– Nei, tað var ikki neyðugt. Danska sendistovan hevði mælt okkum til at brúka tveir russiskar advokatar, harav annar hevur búð í Danmark í fleiri ár og tosar flótandi bæði danskt og russiskt. Advokatarnir gjøredu eitt fyrimyndarligt arbeiði, eins og bæði føroysku og donsku myndugleikarnir gjørdu.

Annan jóladag hevði hann enn onga hóming av, hvat ævintýrið í Murmansk hevur kostað JFK-Trol. Men tað eru stórar upphæddir bæði fyri mistan fiskiskap, advokatar o.a.

– Tíðin fer at vísa, um vit gera nakað burturúr tí. Fyrst er tað sølan av Skálaberg, sigur Hanus Hansen, sum væntar, at tann handilin stendur við.

Annars hevur hann ikki hug at sleppa samstarvinum við Russland, tí tað samstarvið hevur altíð verið gott.

### Avbyrgdir

Umborð fingu vit eitt prát við fyrsta meistaran Jógvan Lydersen.

– Nú er alt gott, og vit hava havt ein óføra góðan túr heim og kundu sigla við fullari ferð, sigur Jógvan Lydersen.

Hann sigur, at tá ið teir høvdu ligið í nakrar dagar á pollinum í Murmansk, vóru onkrir av monnunum nokkso tungir. Teir ótolnaðust og blivu við at spyrja, nær teir sluppu heim. Eingin kendi svarið, men ótolnið kom at ávirka aðrar. Men tað gekk alt kortini.

Lagið umborð var ikki so tungt, tá ið hinir menninir fóru farnir heim.

Menninir sluppu ongantíð í land, bara skiparin, tá ið hann skuldi í rættin. Hanus Hansen slapp eina ferð umborð í tríggjar tímar.